Starvslýsing

Stuðulstænastan

## Stuðulsfólk til ein brúkara í Suðuroy

Málbólkurin hjá Stuðulstænastuni er heimabúgvandi fólk omanfyri 18 ár, ið hava ein skerdan virkisførleika.

**Arbeiðið hjá stuðlinum fevnir um**
- Røkt og aktivering av einum respiratorsjúklingi.
- At skipa so fyri, at brúkarin fær møguleika at leggja gerandislív sítt soleiðis til rættis, at tað verður í samsvar við egnan tørv og normar.

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tú:
- Kann arbeiða sjálvstøðugt og einsamallur í heimi brúkarans og samstundis kann átaka tær at arbeiða í einum øki, har tað ræður um intuitión.
- Vísir áhuga og virðing fyri brúkaranum og samstundis arbeiðir professionelt.
- Er stuðlandi og hjálpir brúkaranum uttan at taka ábyrgdina fyri lívinum frá honum.
- Hevur eina positiva menniskjafatan.
- Kann handfara og trívast við einum arbeiðsdegi, ið einki kann sigast um frammanundan.
- Er sterkur bæði til likams og sálar.

**Stuðulstænastan bjóðar**
- Eitt spennandi arbeiðspláss við møguleikum fyri persónligari og fakligari menning
- Kunning og upplæring í arbeiðinum og supervision.

**Setanartreytir**
Talan er um eitt fast starv innan Nærverkið og roknast má við, at arbeiðstíðirnar eru skiftandi, dag-, kvøld-, nátt- og vikuskiftisarbeiði. Løn sambært avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Setanarøkið er Nærverkið og deildir undir tí.

Fleiri upplýsingar um starvið eru at fáa hjá Jeannu í Lágabø, økisleiðara, á tlf. 373907 og hjá deildarleiðaranum Regin Johansen á tlf. 360000.

Starvið verður sett sum skjótast.

**Umsókn**
Umsóknir skulu sendast til:
Nærverkið
Stuðulstænastan
Argjavegur 26
Postboks 3037
110 Tórshavn
Stílað.: Regin Johansen

**Umsóknarfreist: 2. mai 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

Heimatænastan

## Røktarstarvsfólk til Eldrasambýlið í Vestmanna

Vegna farloyvi verður søkt eftir røktarstarvsfólki at arbeiða 30 tímar um vikuna í skiftandi vaktum at byrja 01.05.2008 og fram til 30.04.2009.

**Førleiki**
- Ynskiligt er, at tú hevur heilsufakliga útbúgving og ella royndir innan eldraøkið
- Fakligan áhuga fyri primera økinum
- Góð samstarvs- og samskiftisevni

**Setanartreytir**
Lønin verður ásett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið er Nærverkið og deildir undir tí.

Vilt tú vita meira um starvið, ert tú vælkomin at venda tær til deildarleiðaran á Eldrasambýlinum tlf. 218149.

Sendi eina skrivliga umsókn saman við prógvi og møguligum viðmælum til:

Heimatænastan Vágar/Norðurstreymoy
Stílað: Sonja Klein, økisleiðari
Hornaveg 12, Heilsumiðstøðin
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist 02. mai 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

Løgmálaráðið

## Verkætlanarleiðari til Løgmálaráðið

Løgmálaráðið arbeiðir við ymiskum málum, ið skulu loysast sum verkætlanir.

Mennast skal nýggj tøknilig skipan til Landsfólkayvirlitið og Lógarsavnið og gerast skal ein økismenningarætlan fyri partar av landinum.

Søkt verður tí eftir verkætlanarleiðara til Løgmálaráðið, ið fær ábyrgdina av, at hesar og møguliga aðrar verkætlanir, ið ráðið arbeiðir við, verða framdar.

Tann, ið settur verður, skal hava útbúgving frá lærdum háskúla ella samsvarandi útbúgving og skal hava royndir at arbeiða við verkætlanum.

Dentur verður lagdur á, at viðkomandi dugir at samstarva og samskipa. Somuleiðis verður dentur lagdur á, at viðkomandi dugir at loysa ósemjur, er førur fyri at taka avgerðir og fær framt ítøkiligu verkætlanirnar.

Starvsheitið er fulltrúi og verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Starvstíðarskeiðið er avmarkað fram til 1. juli 2009, men verður longt, um fígging fæst til endamálið.

Umsóknir við prógvum, CV og møguligum viðmælum skulu sendast til

Løgmálaráðið
Postrúm 159
Tinganes
110 Tórshavn

og skulu verða Løgmálaráðnum í hendi í seinasta lagi mánadagin tann 19. mai 2008.

Umsøkjarar kunnu fáa nærri upplýsing um starvið við at venda sær til Rúna Joensen, aðalstjóra, á telefon 358080.

· Konsertir
· Fundir
· Framsýningar
og annað

# BRÚKIÐ MIÐLAHÚSIÐ




miðlahúsið
í Vágsbotni

FØROYABANKI
stuðlar tiltøkum í Miðlahúsinum

TÓRSGØTA 1 · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW. SOSIALURIN.FO | Sosialurin

Lesið Sosialin -so eru tit við!